## Politikkur á Lærarskúlanum

**Aulan á Føroya Læraraskúla verður í dag karmur um politiskan fund, sum læraralesandi skipa fyri**

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv*

Í dag, mikudagin, kl. 13 verður almennur politiskur fundur á Læraraskúlanum í Havn. Allir flokkar verða umboðaðir, og flestu flokkarnir senda umboð frá floksleiðslunum. Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, verður orðstýrari.

Tað eru næmingar á samfelags- og landalærulinjuni á Læraraskúlanum, sum skipa fyri fundinum.

Øll politisk mál verða sjálvandi til viðgerðar, men næmingarnir vænta, at sjálvstýrismálið og sosialu málini fáa eina gjølliga viðgerð.

Á fundinum sleppa umboðini fyri politisku flokkarnar at leggja fyri við innleggi upp á fimm minuttir í part, síðani verða tvær stuttar rundur við viðmerkingum, har fundarluttakarnir fáa høvi at seta spurningar.

## Minningarorð um abba okkara
# Bjarna Hansen
### á Selheyggi í Klaksvík
### f. 2/12-1923 d. 10/4-2001

Eitt ár er liðið síðan vit mistu teg góði abbi, eitt ár við stórum tómrúmi og sakni. Dagurin, vit fingu boðini um at tú ikki vart millum okkum meir, stendur enn so klárt fyri mær og okkum øllum. Hóast tú teir seinastu 14 dagarnar lá á sjúkrahúsinum og ikki hevði tað so gott, so hopaðu vit tað fór at laga seg. Eg fylti 20 henda dagin og minnist so tíðiliga tá mamma segði mær: "Nú er abbi deyður". Góði abbi tú vart so óførur at vitja okkum saman við ommu, og nú síðan lítli Kristmund er føddur, komu tit næstan hvønn dag, tað var eisini stuttligt at síggja hvussu hann strálaði tá tit komu.

Mangar hugnaligar løtur eru at minnast aftur á saman við tær og ommu, og eisini úti á Selheyggi, tá omma og tú samlaðu alla familjuna, vit vóru nógv, men tað rørdi tykkum ikki, tit tóku altíð væl ímóti okkum, og tað var týðiligt, at tað hevði stóran týdning fyri teg, at vit høvdu tað gott og kendi okkum væl hjá tykkum.

Hóast heilsan tey seinastu árini bilaði vart tú ágrítin, tað var so hugnaligt at síggja teg á bátabrúnni gera klárt at fara út við bát, tað dámdi tær væl og vóru tað fáir dagar tú ikki vart avstað, tá veðrið var til vildar. Vit minnast hvussu tú ofta kom sleipandi við stórari balju av seiði, og hvussu glaður tú vart fyri at geva burtur av til familju og vinfólk.

Góði abbi, tú kendi nógv fólk, tað sást á tí skara, ið fylgdi tær til títt seinasta hvíldarstað her á jørð. Tú hevði í nógv ár títt yrki á sjónum, sum maskinmeistari við millum annað Seglhússkipunum, men eisini arbeiddi tú á landi, og eru tað nógv sum minnast tá tú koyrdi Esso-bilin.

Abbi og omma eiga fimm døtur, Tordis býr í Danmark, Bjørg í Vestmanna og Martha, Thora og mamma her í Klaksvík, 13 abbabørn og 11 langabbabørn og vóru vit tær hvør í sínum lag nakað heilt serligt, altíð áhugaður at hoyra hvussu tað gekst okkum, og koma við góðum ráðum um tað var tað vit høvdu brúk fyri.

Góði elskaði abbi, saknurin er stórur, men minnini eiga vit nógv og tey goyma vit. Góða omma størstur er saknurin hjá tær, má Jesus pápi verða hjá tær og styrkja teg nú tú ert einsamøll.

Ærað veri minnið um teg góði abbi.

***Mai-Britt og lítli Kristmund, Eli og Petrina***

# Kórstevnan 2002 í Vágum á hvítusunnu



KÓRSTEVNA
*Kórsamband Føroya*

Á aðalfundi Kórsambands Føroya í heyst váttaðu umboð fyri Vágakórið, at tey vildu átaka sær at skipa fyri Kórstevnu 2002, og tey mæltu til, at hon varð hildin á hvítusunnu, soleiðis sum hon upprunaliga altíð varð tað, tó so at hon endar hvítusunnudag. Hesari innbjóðing tók fundurin fegin ímóti, og boðini hava so verið borin út til limakórini.

Umráðandi fyri, at stevnan skal eydnast væl, er tað, at funnið verður fram til væl egnaðan høvuðskórleiðara. Í hesum hevur kórsambandið nú verið so heppið at at fá samband við Ragnar Rasmussen, professara í kórleiðslu á tónleikaháskúlanum í Tromsø. Hann hevur verið upp á tal sum kórstevnuleiðari her áður. Tað var Per Oddvar Hildre, sum kórsangarar minnast væl frá kórstevnum í Vági og í Havn, ið fram um aðrar mælti til at heita á Ragnar. Fegin vildi hann koma, men fekk tá ikki fríloyvi frá tónleikastovninum, har hann starvaðist.

### Ragnar Rasmussen ein úrmælingur millum kórleiðarar.

Á norðurlensku kórstevnuni NORDKLANG í Tróndheimi seinasta summar hittu sangarar hiðani Ragnar Rasmussen og upplivdu hann sum ivaleyst tann mest hugtakandi av øllum teim úrmæltu kórleiðarum úr ymsu norðurlondunum, sum høvdu sín virkna lut í stevnuni. Ikki lá fyri at gera avtalu við hann tá um at koma higar, men beint nú herfyri lagaði tað seg betur.

Ragnar Rasmussen er 35 ára gamal og hevur longu ment seg til at vera ein hin fremsti millum kórleiðarar í Noregi. Í 1997 varð hann kosin at umboða Noreg á stóru norðurlendsku-baltisku kórstevnuni á Gotlandi, har hann stjórnaði 5.000 sangarum, í 1998 fekk hann "The Best Conductor Prize" í "Concorso Corale Internatzionale" í Italia, har hann kappaðist ímóti 80 kórleiðarum úr 20 londum, og nú í oktober í fjør vann hann fyrsta prísin í framkomnastu deild í "International Competition for Coral Conductors" í Bologna.

Uttanlands hevur R. Rasmussen annars havt kóruppgávur í londum sum Týsklandi, Italia, Spania, Russlandi, Tjekkoslovakia, Svøríki, Estlandi og Íslandi.

### Fjøllbroytt og spennandi arbeiðslag.

Í Norra hevur Ragnar R. virkað sum kórleiðari og lærari í býum sum Trondheim, Stavanger og Oslo, har hann m.a. stjórnaði Oslo Filharmonisk Kor. Umframt sítt professorat tekur hann sær nú av fleiri kórum í Tromsø og økinum uttanum, eisini í samstarvi yvir landamark á norðurkollinum heilt yvir til Russlands. Í føstum starvi eisini hjá norðurnorska symfoniorkestrinum framførir Ragnar á hvørjum ári tvey størri kórverk, sum tá eisini verða send beinleiðis í sjónvarpi, men Ragnar Rasmussen hevur líka stóran áhuga fyri tí fólksliga.

Á kórstevnuni nú á hvítusunnu í Vágum ætlar Ragnar at arbeiða við einari líknandi skrá sum hana, vit upplivdu á stevnuni í Tróndheimi í fjør, har hann við støði í tí fólkamusikalska arbeiðir rættiliga impovisatoriskt eftir teim umstøðum, sum eru til luttakarar og høli. Hann vil fegin hava sín góða samstarvsfelaga tann kenda tónasmiðin og tónlistasmannin Henning Sommero við sær, so teir báðir í sínum arbeiðshátti kunnu skiftast "at hava orðið" við klaverið og framman fyri fólkið.

### Skal kórstevnuhaldid detta niðurfyri vegna væntandi undirtøku?

Men slíkt spennandi tiltak letur seg bert seta í verk, um kórsangarar veruliga vísa árstevnuni áhuga og tekna seg til luttøku. Næstseinasta kórstevnan, Kórstevna 2000 í Havn, sum við so spennandi verki sum "Sacred Consert" hjá Duke Ellington á skránni, skipað fyri kór og stórband av kórleiðaranum John Høybye, gjørdist ein tann besta, sum verið hevur, var um reppið at verða avlýst, tí so trekliga gekst við tilmeldingum. Stevnan seinasta ár, sum skuldi verða í Vestmanna, varð av ongum vegna verkfall. Tað stóð tí vestmenningum í boði at hava stevnuna har í ár; men teir tóku ikki av, tí eftir stórt og dygdargott fyrireikingararbeiði í fjør vóru tey í teirri støðu, at lítil áhugi tóktist vera at koma á stevnuna. Fyri ikki at koma í slíka støðu, settu tey í Vágakórinum í ár tilmeldingarfreistina so tíðliga sum til 8. apríl. Freistin er nú longd til mánadagin 15. apríl, og hava tá ikki í minsta lagi 100 sangarar teknað seg, verður hon avlýst, og so má hetta 35-ára tíðarskeið við festligari felagskórstevnu í Føroyum á hvørjum ári metast at verða komið at enda.

### Kórleysir sangarar eru líka vælkomnir á kórstevnuna.

Tað vil so vera, at tað er serliga hugaligt at fara á kórstevnu, um fleiri eru í felag, sum syngja saman í tí dagliga, og tá helst so at kór teirra er mannað til egna framførslu á stevnuni. Men aðalendamálið við hesum kórstevnuhaldi er, at sangarar helst úr øllum landinum koma saman til felags kórsang, um tey so annars eru í kóri ella ikki. Tí stendur tað øllum í boði at koma við eisini á kórstevnuna í Vágum í ár. Luttøkugjaldið er 400 kr., og tá býrt tú á skúlanum. Tey, sum heldur vilja búgva á vallaraheimi, rinda 100 kr. aftrat, og veitslan kostar 150 kr. Gjaldið er at flyta inn á konto í Føroya Banka nr. 6460-1640161. Tilmeldingin fer annars fram gjøgnum teldu til majoh@post.olivant.fo ella við at ringja til Mads Johannesen, tlf. 33 33 87.



Valskrá Miðfloksins:

# Kristindómur og trivnaður

**Ein nýggjur landsstýrismaður í familju og trivnaðarmálum telist millum ætlanirnar hjá Miðflokkinum komandi fýra árini. Politikkurin verður sum vant bygdur á tað kristna lívsvirðið. Í fullveldisspurninginum er svarið eitt sindur til báðar síður**

VALSKRÁ
*Heri á Rógvi*

Miðflokkurin hevur kunngjørt sína valskrá til komandi løgtingsval, sum verður 30. apríl. Í valskránni verður størstur denturin lagdur á kristindóm og trivna. Valskráin brýtur frá teimum, vit hava sæð frammanundan. Her verða fosturtøka og Ísrael sett í fremstu røð og vinnumál verður mestsum ikki tikin upp á tungu.

Miðflokkurin er tó greitt ímóti ES-limaskapi.



*–Vit skilja ikki, at mann ikki stuðlar einasta demokratinum í Miðeystri, Ísrael, sigur Jenis av Rana, nú Miðflokkurin hevur kunngjørt sína valskrá til løgtingsvalið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Rættartrygd

Korini hjá teimum eldru, veiku og sjúku fáa nógva umrøðu í valskrá Miðfloksins eins og formaður floksins, Jenis av Rana og Tordur Niclasen nýttu nógva tíð uppá hesi viðurskifti á tíðindafundi týsmorgunin. Teir stóru flokkarnar hava allir havt hetta uppi og vent á teirra tíðindafundum.

Politikkurin hjá Miðflokkinum, sum fylgir kristna lívssýninum, er, at rættartrygd skal vera fyri øll. Flokkurin mælir harðliga ímóti lóggávuni tá tað viðvíkur fosturtøku. Flokkurin heldur tað ikki vera rætt, at eldra ættarliðið, sum hevur stríðst fyri at skapa samfelagið, fær so mikið vánalig kor, ið samfelagið bjóðar teimum sum er. Hesum ætlar flokkurin at bøta um. 40 milliónir skulu setast av á hvørjum ári næstu fýra árini til fleiri røktarpláss, segði Tordur Niclasen á fundinum.

Miðflokkurin er av teirri fatan, at fylgja vit bert bíbliuni viðvíkjandi teim, veiku, sjúku, einkjum, faðirleysu v.m., so verður betur møguleiki fyri at taka sær av øðrum viðurskiftum.

### Javnbjóðispartar

Bill Justinussen segði á tíðindafundinum týsmorgunin, at teir ikki vilja seta í bás í høgra ella vinstara ella loysing ella samband.

–Vit byggja á kristna lívsvirðið fyrst og fremst, sigur altso Bill Justinussen.

Jenis av Rana segði seg leggja lítið í orð sum loysing, ið hann heldur órógva fólk. Miðflokkurin vil hava felagsskap við aðrar tjóðir á jøvnum føti. Hetta skal sjálvsagt vera fyrst og fremst Grønland og Danmark, sigur Miðflokkurin í valskránni.

Miðflokkurin er ikki nøgdur við núverandi ríkisfelagsskap, men hann er eisini misnøgdur við blokkniðurskurðin.

– Vit vilja heldur leggja okkara trygd á Gud, sigur Jenis av Rana.

Hetta leggur flokkin eitt sindur báðu megin í fullveldisspurninginum, har hann áður hevur ligið tættari at samgonguni, men nú hevur lagt seg báðu megin markið.



*Miðflokkurin vil ikki setast í bás. Flokkurin er ímóti blokkniðurskurðinum, tí blokkurin er ogn hjá føroyingum, men flokkurin ynskir broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Kristindómur og Ísrael

Eins og við fosturtøkuni so sært tú ikki nógv til Ísrael í øðrum valskráum til hetta komandi valið. Miðflokkurin vil hava, at Føroyar veita fullan og heilan stuðul til guds land, Ísrael, varð sagt.

– Vit skilja ikki, at mann ikki stuðlar einasta demokratinum í Miðeystri, Ísrael, sigur Jenis av Rana.

Miðflokkurin ynskir eisini at hækka menningarstuðulin til einar tvær milliónir ella meira.

Miðflokkurin hevur als ikki hug at góðtaka, at kristindómur skal deilast við aðrar religiónir um tímarnar í føroysku skúlunum. Dentur skal leggjast á kristindóm og bara kristindóm í skúlunum. Hetta skal vera grundarsteinurin undir einum kristnum lívsstíli.

## MIÐFLOKKURIN

**Valevnir hjá Miðflokkinum til løgtingsvalið 30. apríl 2002.**

**Suðuroy:**
Petur Karl av Rana, Trongisvágur
Rógvi Thomsen, Havlba
Anna Dam, Porkeri

**Sandoy:**
Petur Egholm Poulsen, Skopun
Rúna Hansen, Skopun
Vagn í Geil, Havn

**Vágar:**
Sonni Jacobsen, Sørvágur
Napoleon í Lon, Sandavágur

**Norðstreymoy:**
Dánjal Petersen, Kollafjørður
Fríðbjørn Poulsen, Vestmanna

**Suðurstreymoy:**
Absalon Absalonsen, Havn
Svein Askildsen, Havn
Steindor Hjaltalin, Havn
Poul Hentze, Havn
Álvur Kirke, Kaldbak
Charlotta á Váli Olsen, Havn
Jónfinn Olsen, Argir
Jónfinn Petersen, Argir
Jenis av Rana, Havn
Elin Tausen, Argir

**Eysturoy:**
Áki Andreasen, Fuglafjørður
Sæunn Ólavsdóttir Hansen, Saltangará
Eyðun Jacobsen, Glyvrar
Bill Justinussen, Saltangará
Tordur J. Niclasen, Eiði

**Norðoyggjar:**
Eivind Bringsberg, Klaksvík
Kitty Johannesen, Rituvík
Jógvan Mortensen, Klaksvík